## Thule-dálking staðfest

Ein kanning hjá donsku umhvørvismyndugleikunum hevur nú staðfest umfatandi dálking við amerikonsku radarstøðina í Thule.

Kanningin vísir, at evnið pcb er í fiski og skeljadýrum, at kopar og blýggj eru í øðrum dýrum í sjónum, og á havbotninum hava granskararnir funnið evnið arsen. Tað hevur eisini víst seg, at summi dýr skifta kyn orsakað av dálkingini. Umleið 50 ruskdungar eru við amerikonsku herstøðina í Thule, og haðani eru eitrandi evnið runnin út í umhvørvið. Nakrir av ruskdungunum eru á Dundas-nesinum, sum USA hevur játtað at lata frá sær.

Tað vóru danskir og grønlendskir politikarar, sum vildu hava kannað, um ruskdungarnir við Thule-støðina hava dálkað umhvørvið. Kravið kom, tá samráðingar vóru við USA um ætlanina at nýta radararnar í Thule til ta ætlaðu rakettverjuskipanina.

## Kjarnorkuverk á Mars

Tað er ikki óhugsandi, at fólk fara at búgva á gongustjørnuni Mars um eini 30 ár, og at har verða bæði bústaðir og kjarnorkuverk.

Tað halda í hvussu er russiskir serfrøðingar, sum hava ætlanir um at byggja eitt kjarnorkuverk á Mars. Verkið skal eftir ætlanini byggjast í fjallalendinum á gongustjørnuni, og tað skal tryggja fólkinum á gongustjørnuni nóg mikið av orku. Russisku serfrøðingarnir viðganga, at tað er ikki bara sum at siga tað at byggja eitt kjarnorkuverk á Mars, og at teir eru framvegis ikki komnir eftir, hvussu fólkið har kann tryggjast ímóti geiðslavirknum strálum.

Eitt kjarnorkuverk og bústaðir viga nógv, men hóast tað eru 300 milliónir kilometrar til Mars, halda russar ikki, at hetta verður nakar trupulleiki. Teir siga, at tað ber væl til at senda byggitilfarið hagar við ómannaðum rúmdarførum. Síðani skulu tey, sum skulu byggja bygningarnar, sendast avstað.

## Nútíðar seyðatjóvar

Tey, sum halda, at tað at stjala seyð var ein óskikkur, sum langt síðani er farin í søguna, mistaka seg.

Í hvussu er vil norski bóndin Erik Myhrvold vera við, at onkur hevði stolið fýra seyyðir frá sær og flutt teir yvir um svenska markið. Seinasta fríggjadag var hann so í Svøríki eftir seyðunum. Erik Myhrvold sigur, at sjálvandi kann seyður fara av haga, men so var neyvan hesaferð, heldur hann, tí tað tók honum trý korter at fáa seyðirnar heimaftur – í bili.

Talan er kortini ikki um seyðatjóvar av tí slagnum, sum plagdu at gera um seg í Føroyum fyrr. Norsku bøndurnir halda, at tað eru fólk, sum ilskast um, at seyðurin legst í urtagarðarnar, sum taka seyðin og flyta hann so langt burtur, at hann ikki skal gera meiri ónáðir. Nú hava bøndurnir so sett menn at ansa seyðinum.

## Kokainkríggj

Amerikanarar ætla sær at økja hjálpina til stjórnina í Colombia, sum roynir at fáa bilbukt við teir nógvu kokainbøndurnar í landinum.

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, var í Colombia fyrradagin, og tá segði hann, at hann er til reiðar at lata amerikonsk flogfør avdúka bøndur, sum dyrka kokainplantur, so tær kunnu verða oyðilagdar, áðrenn kokainið kemur á marknaðin. Fyri nøkrum árum síðani flugu amerikonsk flogfør regluliga í Colombia, men tey góvust, tá eitt lítið amerikanskt flogfar varð skotið niður har í 2001.

Hetta seinasta árið hava Colombia og Peru roynt at fáa USA at taka flogeftirlitið uppaftur, tí tey halda hetta vera besta vápnið ímóti rúsevnishandlinum, sum fíggjar fleiri av teimum uppreistrarfelagsskapunum, sum javnan gera um seg í teimum báðum londunum.

# Hann var ein av veteranunum

**Serligi ST-sendimaðurin í Irak, Sergio Vieira de Mello, var gamal í garði í ST-skipanini. Fyrradagin doyði hann í bumbuálopinum í Bagdad**

ST
*Árni Joensen*


*Sergio Vieira de Mello saman við ST-aðalskrivaranum Kofi Annan*

Sergio Vieira de Mello var brasilskur diplomatur. Í 1969, tá hann var 21 ára gamal, fór hann at arbeiða hjá flóttafólkastovninum hjá ST, UNHCR, og í 1996 gjørdist hann varaleiðari hjá stovninum.

Hann var sera dugnaligur og fekk fleiri seruppgávur í kreppuraktum økjum. Eitt nú var hann UMHCR-umboðsmaður í Bangladesh, Sudan, Kypros, Mosambik, Peru og í Jugoslavia.

Aftan á 1996 arbeiddi hann fyri tað mesta á ST-høvuðsborgini í New York, men í 2000 varð hann sendur til Eysturtimor, og har umboðaði hann heimsfelagsskapin tey bæði næstu árini. Tað var hann, sum vegna ST skipaði fyri, at Eysturtimor fekk sjálvsstýri frá Indonesia.

Í september í fjør varð Sergio Vieira de Mellohákommiserur hjá ST fyri mannarættindum, men í vár tók hann við sum serligur sendimaður hjá Kofi Annan, aðalskrivara í Irak. Fyrradagin doyði hann, tá ein bilbumba brast uttan fyri skrivstovu hansara í Bagdad.

### Virdi irakar

Í Irak royndi Sergio Vieira de Mello at ávirka amerikonsku og bretsku hermenninar til at vísa størri virðing fyri irakska fólkinum og teirra siðum og vanum. Hann segði eisini alment, at hersetingin var eyðmíkjandi fyri irakar.

Fyri tveimum mánaðum síðani lovaði amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, ST-sendimanninum at bøta um kortini hjá tí einstaka irakanum. Tað er kortini greitt, at leikluturin hjá de Mello hevur verið avmarkaður, tí Paul Bremer hevur bert gjørt eftir beinleiðis boðum úr Washington.

Brasilsku myndugleikarnir hava boðað frá landasorg í tríggjar dagar, nú Sergio Vieira de Mello er deyður. Hann var 55 ára gamal.

# Friðartilgongdin í klønum tráð

**Blóðuga bumbuatsóknin í Jerusalem hevur av álvara sett friðartilgongdina í Miðeystri í vanda**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Friðartilgongdin í Miðeystri hongur í einum klønum tráð aftan á ta ógvusligu sjálvmorðsbumbuatsóknina at einum fullsettum bussi í Jerusalem fyrrakvøldið, sum kravdi átjan mannalív og særdi umleið 120.

Ísraelska stjórnin kunngjørdi alt fyri eitt, at hon hevði slitið alt samband við teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnar. Tveir av teimum víðgongdu palestinsku felagsskapunum, Islamskt Jihad og Hamas, boðaðu frá, at teir høvdu skipað fyri atsóknini, og tað bar í sær, at palestinski forsætisráðharrin, Mahmoud Abbas, alt fyri eitt sleit sambandið við teir.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur fleiri ferðir kravt, at Abbas og hansara menn skulu gera enda á teimum víðgongdu felagsskapunum. Týskvøldið ásannaði Bush óbeinleiðis, at hetta verður ein torfør uppgáva, og hann bað tí Abbas leita sær ta hjálp, sum er neyðug.

†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jóhannes Poulsen á Válinum**

andaðist týsdagin 19. august, 84 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.00 úr Vestmanna kirkju

*Vegna familjuna*

**Tordis**



# Virusbrævakaos

**Postsevararnir hjá Føroya Tele stóðu at bresta týsdagin, tá tann higartil størsta mongdin av teldubrøvum við teldu-virus nakrantíð sæð í Føroyum knappliga byrjaði at floyma inn**




VIRUS
*Rúnar Reistrup*

Tað var um reppið at føroyskar fyritøkur vórðu raktar av teirri mest umfatandi teldufarsóttini nakrantíð. Tað var ein sonevndur ormur, hesin kallaður W32/Sobig.F, ið var atvoldin til farsóttina, sum orsaka av síni óvanligu stóru smittingarferð kom óvart á allar antivirusframleiðarar.

Farsóttin varð fyrstu ferð sædd mánadagin. Tíðliga týsmorgunin byrjaði hon at breiða seg skjótt í USA, og umleið klokkan 10.30 gjørdi hon rættiliga innrás í Føroyum. Til alla lukku eydnaðist netumsitarunum á Føroya Tele at dagføra virusskannaran stutta løtu frammanundan. Ígjøgnum dagin fangaði dagfórdi viruskannarin 17.800 teldubrøv, ið bóru virusið. Hesi høvdu øll farið ótarnað út til móttakararnar, um ikki virusskannarin var dagførdur.

Vanliga er eingin trupulleiki at dagføra í góðari tíð. Føroya Tele leggur allar dagføringar inn umgangandi. Men hesaferð høvdu sjálvt framleiðararnir av teimum fremstu antivirus forritum trupulleikar, tí virusið ferðaðist so skjótt sum ongantíð sæð fyrr. Kenda antivirusforritið McAffeevar ikki klárt við sínari dagføring fyrr út ímóti klokkan fýra seinnapartin týsdagin. Hevði Føroya Tele dúvað upp á hetta forrit, vóru fleiri túsund virusteldubrøv farin ótarnað ígjøgnum.

### Avsendarin tað bera gass

So fræg fólk sum aðalstjórar landsstýrisins, bæði núverandi og ein einsamallur fráfarin, stóðu í gjár sum avsendarar av nøkrum av teimum hundraðtals virusberandi teldubrøvunum, sum postservarin á Sosialinum stríddist við at taka ímóti seinnapartin týsdagin.

Men talan var tó ikki um nakað samskipað virusálop á blaðið frá landsins umsitingarligu aðalstjórum, og heldur ikki um at øll aðalstýrini høvdu fingið virus. Talan var bert um ein frekan virusorm, sum setir guð og hvønn man sum avsendara av virussmittaðum telduposti.

- Avsendarin, sum stendur á virustelduposturnum er tað bera gass. Man kann vera vísur í, at tað ikki er tann veruligi avsendarin, sigur Páll Wiberg Joensen, leiðari á IP-Net deildini hjá Føroya Tele.

Og hann skuldi, um nakar, vitað, tí hann hevur ábyrgdina av at tyggja meginpartin av føroysku teldupostadressunum ímóti virusi. Týsdagurin var ein av hansara harðaru arbeiðsdøgum.

- Tað var trýst á týsdagin. Vit máttu blokera fleiri afsendarar, fyri at postservarin ikki skuldi fara niður. Og millum kl. 16 og 17.30 máttu vit stilla øll teldubrøv í kø, sigur Páll Wiberg Joensen, leiðari á IP-Net deildini hjá Føroya Tele.

### Soleiðis kennir tú W32/Sobig.F

Eitt av hesum stendur í evnislinjuni á virusteldubrøvunum:

Re: Details
Re: Re: My details
Re: Approved
Re: Your application
Re: Wicked screensaver
Re: That movie

Eitt av hesum stendur í innihaldinum:

See the attached file for details
Please see the attached file for details.

Viðhefti fílurin, sum ber sjálvt virusið, eitur eitt av hesum nøvnum:

your_document.pif
document_all.pif
thank_you.pif
your_details.pif
details.pif
document_9446.pif
application.pif
wicked_scr.scr
movie0045.pif

Kelda: Comendo A/S


J. Broncksgøta 35 | P. O. Box 370 | FO-110 Tórshavn
tlf 34 59 60 | fax 34 59 52 | T-postur: cargo@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

Jákup Mikkelsen flytur við
SMYRIL LINE




SMYRIL LINE